# Blákrossheimið

Grannskoðanarprotokoll frá
5. mars 2018

viðvíkjandi ársroknskapinum fyri 2017

*Protokollin hevur 10 síður*

# Innihald


1 Byrjan 190

2 Grannskoðanin 190
2.1 Grannskoðanarátekning 190

3 Viðmerkingar og tilmæli 190
3.1 Innanhýsis mannagongdir og -eftirlit 190
3.2 Fyrisitingarlig grannskoðan 191

4 Um ársfrásøgnina v.m. 192
4.1 Rakstrarroknskapurin 192
4.2 Fíggjarstøðan 193
4.3 Leiðslusamsýning 193
4.4 Transaktiónir við nærstandandi partar 193
4.5 Meirvirðisgjald 193

5 Onnur viðurskifti 194
5.1 Leiðsluváttan 194
5.2 Skeivar upplýsingar í ársroknskapinum orsakað av sviki 195
5.3 Hendingar eftir roknskaparlok 196
5.4 Tryggingarviðurskifti 196

6 Aðrar upplýsingar 196
6.1 Onnur arbeiði 196
6.2 Formligar skyldur 196

7 Lógarkravd váttan 197

# 1 Byrjan

Sum grannskoðarar stovnsins hava vit útint ta í lóg um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. umroddu grannskoðan av ársroknskapinum fyri Blákrossheimið fyri 2017.

Ársroknskapurin fyri 2017 vísir niðanfyri uppsettu ársúrslit, ogn og útjavningarkonto:

| kr. | 2017 | 2016 |
|---|---|---|
| Nettoútreiðsla fyri árið | 5.959.695 | 6.023.280 |
| Ogn til samans | 239.220 | 29.632 |
| Útjavningarkonto | 214.523 | -40.363 |

# 2 Grannskoðanin

Viðvíkjandi endamáli, skipan og fremjan av grannskoðanini verður víst til protokollina frá 24. mars 2012 um ábyrgdarbýti í sambandi við roknskaparframlogu og endamál og vav av grannskoðanini. Grannskoðanarprotokollin er einans gjørd til nýtslu hjá nevndini, og skal ikki brúkast av øðrum ella til annað endamál.

Grannskoðanin hevur fyrst og fremst fevnt um ymsar metingar og sundurgreiningar av roknskaparupphæddum, eins og vit hava tikið stakroyndir av bókingarskjølum. Harumframt hava vit gjøgnumgingið avstemmanir av øllum týðandi upphæddum í fíggjarstøðuni, eins og vit hava tryggjað okkum, at ársroknskapurin samsvarar við bókhaldið.

Vit skulu upplýsa, at vit ikki vita um nakran feil, sum ikki er rættaður í roknskapinum.

Einki kassaeftirlit er gjørt í árinum.

Vit hava lisið gerðabókina hjá nevndini til og við fundin 8. november 2017.

## 2.1 Grannskoðanarátekning

Góðkennir leiðslan ársroknskapin í verandi líki, geva vit ársroknskapinum fyri 2017 eina grannskoðanarátekning uttan fyrivarni og uttan ískoytisupplýsingar.

# 3 Viðmerkingar og tilmæli

## 3.1 Innanhýsis mannagongdir og -eftirlit

Fyri at minka um vandan fyri, at feilir koma fyri og/ella at stovnurin verður fyri missi, verður mælt til, at mannagongdir verða gjørdar/styrktar á hesum økjum:

- **Setanarprógv**
  Í samband við grannskoðanina undanfarin ár hava vit viðmælt, at setanarprógv verða gjørd fyri øll starvsfólk, sum hava krav upp á hetta sambært Ll nr. 20 frá 8. mai 2008. Vit hava í samband við grannskoðanina í ár við stakroyndum eftirkannað, at setanarprógv fyriliggja. Arbeiði hevur ikki givið orsøk til viðmerkingar.

- **Útbúnaðaryvirlit**
  Í samband við grannskoðanina undanfarin ár varð staðfest, at stovnurin ikki hevði yvirlit yvir útbúnað o.t. hvørs keypsvirði er minni enn 75 tkr sambært "Kunngerð um roknskaparverk landsins o.t.". Hesum hava vit fylgt upp í samband við grannskoðanina í ár og staðfest, at útbúnaðaryvirlit er gjørt og seinast dagført 12. desember 2017. Samlaða virðið av innbúgvi stovnsins er 2.423 tkr.

## 3.2 Fyrisitingarlig grannskoðan

Sambært løgtingslóg um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. skal fyrisitingarlig grannskoðan av Blákrossheiminum fremjast. Rundskriv frá 19. september 2011 ásetir nærri, á hvønn hátt Blákrossheimið hevur skyldu at taka neyðug búskaparlig atlit.

Grundsjónarmiðini aftanfyri fyrisitingarliga grannskoðan eru:

**Sparsemi**: Grannskoðanin skal kanna, um stovnurin hevur sýnt neyðugt fíggjarligt umhugsni í sambandi við keyp av vørum og tænastum.

**Framleidni**: Grannskoðanin skal meta um lutfallið millum úrslitið og virksemi stovnins og tilfeingið.

**Virkisføri**: At endamál stovnins er útgreinað, og at stovnurin nýtir tilfeingið samsvarandi hesum endamáli.

**Fíggjarstýring**: At fíggjarstýringin verður løgd til rættis soleiðis, at tað er samanhangur millum útreiðslur og framleidni.

Leiðarin hevur upplýst, at játtanin og inntøkurnar fyri árið 2017 eru brúktar við støði í "Rundskrivi um eftirlit og at taka neyðug búskaparlit atlit" frá 19. september 2011 við atliti at sparsemi, framleidni, virkisføri og fíggjarstýring.

Viðvíkjandi sparsemi, so framgongur av roknskaparreglugerðini hjá Blákrossheiminum, at í sambandi við øll størri keyp skal tilboð umbiðjast. Vit hava upp á fyrispurning fingið upplýst, at roknskaparreglugerðin verður fylgd. Harumframt skal viðmerkjast, at stovnurin eisini biðir um tilboð í samband við smærri veitanir.

Fyrisitingarlig grannskoðan viðvíkjandi framleidni og virkisføri krevur, at Blákrossheimið hevur ásett innanhýsis mál og ger mátingar av gongdini hesum viðvíkjandi. Vit hava fingið upplýst, at Blákrossheimið m.a. hevur sett sær sum mál at arbeiða við hagtølum, eftirmetingum og rúsevnapolitikki. Vit hava fingið upplýst, at stovnurin eftirmetir síni tiltøk.

Eingin mál- og avrikssáttmáli er gjørdur millum Blákrossheimið og Heilsu- og innlendismálaráðið fyri 2017. Okkum er upplýst, at stovnurin hevur fingið boð frá Heilsu- og

innlendismálaráðnum, at bíða eftir boðum um nærri ásetingar. Stovnurin hevur síðan fráboðanina einki frætt í málinum.

Viðvíkjandi fíggjarstýringini hava vit sæð, at rakstraræltan fyri 2017 í gjognum árið er samanborin við roknskapin fyri 2017, og at fíggjarætlan eisini er gjørd fyri 2018. Vit hava somuleiðis sæð, at Blákrossheimið hevur skipaða fyrisiting.

# 4 Um ársfrásøgnina v.m.

Niðanfyri er í stuttum greitt frá innihaldinum í útvaldum roknskaparpostum og frá okkara grannskoðan av hesum postum. Vit eru samd við leiðsluni í teirra uppgerð av einstøku roknskaparpostunum.

## 4.1 Rakstrarroknskapurin

**Inntøkur, 6.894 tkr. (2016: 6.076 tkr.)**
Inntøkurnar eru hækkaðar við 828 tkr. í mun til 2016 og stendst hækkingin serliga av, at stovnurin í 2017 byrjaði DAT-ung virksemi. Játtanin á fíggjarlógini til DAT-ung virksemi var 800 tkr., meðan samlaðu útreiðslurnar vóru 889 tkr. Meirnýtslan er fíggjað av Bláa Krossi Føroya, soleiðis at nýggja virksemi ikki hevur havt ávirkan á rakstrarúrslitið hjá stovninum.

Vit hava í sambandi við grannskoðanina staðfest, at innroknaða rakstrarjáttanin til Blákrossheimið eins og stuðulsjáttanin til DAT-virksemi er í tráð við játtaðu upphæddirnar á fíggjarlógini.

Játtanin er upprunaliga givin til Bláa Kross Føroya, men sambært avtalu við Heilsu- og innlendismálaráðið er hendan flutt til Blákrossheimið.

**Lønir**
Allar lønir hjá Blákrossheiminum verða avgreiddar av Føroya Gjaldstovu og fluttar gjøgnum eitt felags virkistal (V-tal) hjá Føroya Gjaldstovu til TAKS. Hetta ger, at Blákrossheimið ikki kann gera eina sjálvstøðuga avstemman mótvegis TAKS av útgoldnum lønum.

Vit hava við stakroyndum kannað, um løn er goldin sambært galdandi lønartalvum og setanarskrivum. Vit hava ongar viðmerkingar til gjøgnumgongdina.

Vit hava í samband við grannskoðanina ansað eftir, at skyldugir tímar við árslok 2017 eru tíðaravmarkaðir í tráð við rundskriv frá 18. desember 2017.

**Kostnaður, 6.893 tkr. (2016: 6.130)**
Útreiðslurnar eru hækkaðar við 763 tkr. í mun til 2016. Hækkingin stendst serliga av útreiðslum í samband við DAT-ung virksemi, ið byrjaði í 2017. Vit hava við stakroyndum kannað eftir, at útreiðslurnar verða váttaðar av leiðsluni soleiðis sum fyriskrivað í roknskaparreglugerðini. Arbeiði gav ikki orsøk til viðmerkingar.

**Rakstrarúrslit, 0 kr. (2016: -53 tkr.)**
Rakstrarúrslitið fyri 2017 er eitt avlop upp á 305 kr., sum er 53 tkr. hægri enn í 2016.

## 4.2 Fíggjarstøðan

**Tøkur peningur, 8 tkr. (2016: 23 tkr.)**
Vit hava staðfest, at tøkur peningur samsvarar við upplýsingar frá peningastovnunum.

**Stuttfreistað skuld, 25 tkr. (2016: 70 kr.)**
Stovnurin hevur við árslok innroknað 9 tkr. í skyldigari lon. Talan er um lonarhækkan í 2017, sum ikki er flutt til starvsfólkini í árinum. Harumframt eru innroknaðar 16 tkr. í skyldugaum tímum við árslok 2017 sambært ásetingum í rundskrivi um at tíðaravmaarka lonir í landsroknskapinum.

## 4.3 Leiðslusamsýning

**Løn til leiðslu**
Leiðarin hevur fingið útgoldið 486 tkr. í A-inntoku í árinum umframt eftirlon.

**Nevndarsamsýning**
Nevndin hevur ikki fingið útgoldið samsýning.

## 4.4 Transaktiónir við nærstandandi partar

Sum liður í grannskoðanini hava vit fingið váttað, at út yvir lonarsamsýning til leiðaran hevur Blákrossheimið havt hesar transaktiónir við nærstandandi partar:

Blái Krossur Foroya eigur bygningin, har Blákrossheimið húsast. Formlig leiguavtala fyriliggur, sum er góðkend av Heilsu- og Innlendismálaráðnum í skrivi dagfest 11. juni 2015.

Harumframt er avtala gjord millum Blákrossheimið og Bláa Kross Foroya um gjald fyri bókhald og aðrar tænastur. Mánaðarliga gjaldið til Bláa Kross Foroya upp á 8.500 kr. er ásett í formligari avtalu, ið er undirskrivað av báðum portum í 2010.

## 4.5 Meirvirðisgjald

Vit hava sæð, at stovnurin fær endurrindað keyps-mvg eftir galdandi reglum fyri almennar stovnar.

# 5 Onnur viðurskifti

## 5.1 Leiðsluváttan

Dagligi leiðari stovnsins hevur undirskrivað niðanfyristandandi leiðsluváttan:

**"Leiðsluváttan viðvíkjandi ársroknskapinum fyri árið 2017 hjá Blákrossheiminum**

Henda leiðsluváttan er gjørd í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum hjá Blákrossheiminum fyri 2017. Ársroknskapurin vísir eina nettoútreiðslu fyri 2017 upp á 5.960 tkr. og eina útjavningarkonto upp á 215 tkr.

Tað er mín ábyrgd at gera ein roknskap, sum í øllum týðandi lutum er í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t."

Sambært míni bestu sannføring vátti eg hervið:

at roknskapurin inniheldur allar tær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at meta um ársúrslitið og fíggjarligu støðuna hin 31. desember 2017,

at grannskoðanin hevur fingið atgongd til alt roknskapartilfar og alt tilhoyrandi skjalprógv,

at eg ikki havi kunnleika til ella illgruna um óreglulig viðurskifti ella svik hjá leiðslu ella starvsfólkum, sum kunnu føra til viknan ella umleypan av viðtiknu innanhýsis eftirlitsskipanunum, ella sum kunnu hava týðandi ávirkan á rættleikan av roknskapinum,

at eg havi ábyrgdina av at gera, seta í verk og viðlíkahalda roknskapar- og innanhýsis eftirlitsskipanir við atliti at fyribyrgja og varnast svik og feilir,

at tað í umsitingini av Blákrossheiminum eru tikin neyðug fíggjarlig atlit,

at stovnsins innanhýsis mannagongdir og eftirlit verða mett at vera fyriskipað og at virka á ein tryggjandi hátt við tí fyri eyga at fyribyrgja og avdúka svik og feilir,

at allar hendingar síðan roknskaparárslok 2017, sum hava týðandi ávirkan á fíggjarligu støðu stovnsins, eru tiknar við í roknskapin,

at allar fíggjarligar skyldur, sum hvíla á stovninum, eru tiknar við í roknskapin, herundir umhvørvisskyldur. Eg havi ikki - út um tað sum stendur í roknskapinum - kunnleika til endurgjaldskrøv, møguligar rættarsakir ella aðrar eventualskyldur, so sum borganar-, trygdar-, eftirlønar- ella líknandi skyldur, sum í týðandi mun høvdu ávirkað fíggjarligu støðu stovnsins,

at játtanin fyri árið 2017 er brúkt við støði í "Rundskrivi um eftirlit og at taka neyðug búskaparlig atlit" frá 19. september 2011 við atliti til sparsemi, framleiðni, virkisføri og fíggjarstýring,

at eg havi upplýst grannskoðaranum um allar nærstandandi partar stovnsins, og um allar transaktiónir stovnsins við nærstandandi partar, sum eg eri kunnug við,

at allar transaktiónir stovnsins við nærstandandi partar eru framdar til marknaðartreytir,

at stovnurin hevur ognarrættin til allar ognirnar í fíggjarstøðuni, og ongar avmarkingar eru í avgerðarrættinum, og ongar veðsetingar ella aðrar trygdarveitingar eru út um tað, sum víst er í roknskapinum,

at stovnurin hevur teknað tryggingar í so stóran mun, at eg meti, at ognir stovnsins og stovnurin sum heild eru rímiliga tryggjaðar, um skaði skuldi hent,

at eg havi ikki kunnleika til ætlanir viðvíkjandi stovninum, sum kunnu hava eina heilt aðra meting av ognum og skyldum við sær enn tað, sum víst er í roknskapinum hin 31. desember 2017,

at eg havi umrøtt allar hendingar og viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri stovnsins við grannskoðaran og vænti, at rakstur stovnsins heldur fram 12 mánaðir frá fíggjarstøðudegnum. Mín meting av førleika stovnsins viðvíkjandi framhaldandi rakstri er grundað á allar atkomuligar upplýsingar og mína hollu vitan um stovnsins væntandi rakstur og fígging,

at eg havi gjøgnumgingið og góðkent uppskot til rættingar og eftirbókingar frá grannskoðaranum, sum eru tiknar við í ársroknskapin. Í teimum førum har eg havi mett, at ávirkanin av ikki rættaðum feilum, bæði í hvørjum einstøkum føri og samlað, ikki eru av týdningi fyri ársroknskapin, síggjast hesir í einum hjáløgdum yvirliti, og

at peningaførleiki stovnsins verður mettur at vera nóg góður til, at gjaldføri er til taks til framhaldandi rakstur stovnsins í roknskaparárinum 2018."

## 5.2 Skeivar upplýsingar í ársroknskapinum orsakað av sviki

Sum grannskoðarar hava vit skyldu til við professionellum ivasemi at umhugsa vandan fyri skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella feilum.

Í sambandi við planleggingina av grannskoðanini hava vit sett okkum inn í, hvussu leiðarin hevur eftirlit við vandanum fyri sviki og hvørjar innanhýsis mannagongdir og –eftirlit, sum eru sett í verk, fyri at minka um váðan.

Leiðarin hevur váttað, at

- leiðarin hevur ábyrgdina av at gera, seta í verk og viðlíkahalda roknskapar- og innanhýsis eftirlitsskipanir á stovninum við atliti at fyribyrgja og varnast svik og feilir,
- innanhýsis mannagongdir og – eftirlit hjá Blákrossheiminum verða mett at vera fyriskipað og at virka á ein tryggjandi hátt við tí fyri eyga at fyribyrgja og avdúka svik og feilir,
- leiðarin ikki hevur kunnleika til ella illgruna um óreglulig viðurskifti ella svik hjá leiðslu ella starvsfólkum, sum kunnu føra til viknan ella umleypan av viðtiknu innanhýsis eftirlitsskipanunum, ella sum kunnu hava týðandi ávirkan á rættleikan av ársfrásøgnini.

Altjóða standardarnir um grannskoðan krevja, at vit spyrja leiðsluna, um hon hevur kunnleika til staðfest svik ella hevur illgruna um slíkt. Vit loyva okkum at meta nevndarinnar undirskrift á fyriliggjandi grannskoðanarprotokoll sum eina staðfesting av, at leiðarin ikki hevur kunnleika til slík viðurskifti.

Í sambandi við grannskoðanina eru vit ikki vorðin varug við viðurskifti, ið týða upp á ella vekja mistanka um svik, ið hevur týdning fyri ársroknskapin.

## 5.3 Hendingar eftir roknskaparlok

Við tí fyri eyga at tryggja, at týðandi hendingar eftir roknskaparlok eru tiknar við í ársroknskapin á rættan hátt, hevur leiðarin gjognumgingið og gjørt sínar metingar av hendingum eftir roknskaparlok.

Leiðarin hevur upplýst, at tey ikki meta, at tað eftir roknskaparlok hava verið týðandi hendingar, sum ikki eru tiknar við á rættan hátt í ársroknskapinum.

Í sambandi við okkara gjognumgongd av hendingum eftir roknskaparlok eru vit ikki vorðin varug við týðandi viðurskifti, sum ikki eru tikin við á rættan hátt í ársroknskapinum.

## 5.4 Tryggingarviðurskifti

Okkara grannskoðan hevur ikki fevnt um tryggingarviðurskiftini. Okkum er upplýst, at mannagongdin er, at tryggingar stovnsins regluliga verða gjognumgingnar av bókhaldinum og tryggingarfelagnum fyri at meta um tryggingartørvin.

Vit hava fingið upplýst, at tryggingar stovnsins seinast eru gjognumgingnar í juli 2015 av tryggingarráðgeva stovnsins. Okkum er upplýst, at stovnurin hevur teknað lógarkravdar starvsfólkatryggingar.

Leiðarin hevur í sambandi við grannskoðanina upplýst, at mett verður, at tryggingarviðurskiftini hjá Blákrossheiminum eru í tráð við rundskriv um "Tryggingarviðurskifti landsins".

Vit eru ikki serkøn í tryggingarviðurskiftum og tí ikki før fyri at meta um, hvørt teknaðu tryggingarnar geva eina hóskandi trygd.

# 6 Aðrar upplýsingar

## 6.1 Onnur arbeiði

Umframt grannskoðanina av ársroknskapinum fyri 2016 hava vit síðani grannskoðanarprotokollina frá 23. februar 2017 gjørt niðanfyristandandi arbeiði fyri stovnin:

- sett upp ársroknskapin fyri 2017

## 6.2 Formligar skyldur

Vit hava ansað eftir, at:

- fundarbók verður førd fyri nevndarfundir, og
- at grannskoðanarprotokollir verða undirskrivaðar av nevndini

**Fundarbók hjá nevndini**

Vit hava lisið fundarbókina til og við fundin tann 8. november 2017.

Í sambandi við lesturin av fundarbókini eru vit ikki komin fram á viðurskifti, sum ikki eru viðgjord á noktandi hátt í ársroknskapinum.

# 7 Lógarkravd váttan

Sambært galdandi lóggávu um virksemið hjá loggildum grannskoðarum verður váttað,

at undirritaði lýkur tær í lóggávuni ásettu habilitetstreytir, og

at undirritaði í sambandi við grannskoðanina hevur fingið allar upplýsingar, sum biðið er um.

Tórshavn hin 5. mars 2018
SPEKT loggildir grannskoðarar Sp/f

Mirjam Haraldsen
*statsaut. revisor*

Framlogd á fundi hin / 2018

Nevndin:

| | | |
|---|---|---|
| Álvur Hojgaard<br>*formaður* | Hjalmar Hansen<br>*næstformaður* | Asta Marjunardóttir |